**Almenni bygdaráðsfundurin 05.03.2007**

**Mál nr. 16/2007 Jarðarmál.**
**Umsøkn um grundstykki.**
Hin 30.01.2007 søkja Eimie og Henry Mohr um grundstykki á Nesi.
Talan er um grundstykkið matr.nr. 659c

Tekniska nevnd mælir til at játta teimum loyvi til umsøkta grundstykkið.

**Avgerð:** Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 17/2007 Jarðarmál**
**Umsøkn um grundstykki.**
Hin 14.02.2007 søkir Jarmund Joensen um grundstykki til sethús. Stykkið hugsað verður um liggur á matr. nr. 148,118,108 og 61 á Gørðum á Nesi og skal verða frá vegkrossinum og suðureftir.

Tekniska nevnd mælir til. at játta Jarmund Joensen stykkið nr. 148, sum er tað norðasta við vegin á Gørðum.

**Avgerð:** Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 18/2007 Jarðarmál.**
**Uppískoytisstykki.**
Hin 30. januar 2007 søkir Jóan Jakku Skoradal, Toftir, um at fáa loyvi til at keypa tvey tey norðastu ognarstykkini niðanfyri grundstykki hjá Henriannu Johannesen, ið greinsa norður móti grundstykkinum hjá honum, sum uppískoytisstykkir til grundøkið.
Talan er um matr. nr. 530. sum er 91 m² og 490a, ið er 67 m², og ætlar hann at planera hesi stykkini.

Tekniska nevnd mælir til at játta umsóknini treytað av, at grannin ikki hevur ætlanir, og at hann verður hoyrdur í málinum. Eisini skal kannast um kloakkrør og tílíkt liggja í stykkunum.
**Avgerð:** Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 19/2007 Umhvørvismál**
**Plantupakkar til borgarnar.**
Hin 08.02.2007 kom tilboð frá skógrøkt landsins viðv. plantipakkum. Talan er um smáar plantipakkar har planturnar eru umleið 20-60 cm høgar.

Mentanarnevndin mælir til, at kommunan keypir 250 plantipakkar, og kunnu teir avheintast ruddingardagin 28.apríl.

Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini.

**Avgerð:** Tilmælini samtykt.

**Mál nr. 20/2007 Umhvørvismál**
**Reglugerð fyri IRF.**
Í skrivi dagfest 16.02.2007 sigur IRF frá, at leiðslan hevur arbeitt við, at samskipa viðurskifti, viðv. viðtøkunum og ymiskum reglum, og samskipa hetta í nøkrum fáum avmarkaðum reglum, sum kunnu verða samtyktar á aðalfundi.

Teir skjóta upp at virksemið felagsins verður lýst og skipað í fýra reglugerðum:

- Reglur um rusk og burturkast frá húskjum í IRF-limakommunum
- Reglu um burturkast frá virkjum í IRF-limakommunum
- Reglu um rottangatøming frá húsarhaldum í IRF-limakommunum
- Reglur um rottangatøming frá virkjum í IRF-limakommunum.

Hjálagt eru uppskotini til omanfyri nevndu punktir.
Møguligar viðmerkingar skulu verða IRF í hendi í seinasta lagi 13. mars 2007.

Mentanarnevndin mælir til at taka undir við uppskotunum til reglugerðir fyri burturkast frá húsum, virkjum og rottangatøming hjá húskjum og virkjum.

**Avgerð:** Tilmælið samtykt.

**Mál nr. 21/2007 Umhvørvismál.**
**Ruddingardagur.**
Kommunan hevur havt ruddingardag á hvørjum árið og um so er, at ein slíkur ruddingardagur skal vera, so er spurningurin nær hesin dagur skal vera og hvussu hann skal fara fram.
Seinasta ár var ruddingardagurin skipaður saman við eini hugnaløtu og útdeiling av plantupakkum, og eyðnaðist hetta væl.
Nær skal ruddingardagurin vera og hvussu skal hann skipast?

Mentanarnevndin mælir til at hava ruddingardagin leygardagin 28. apríl 2007 og hava eina hugnaløtu omanfyri egningaskúrarnar tá ruddingin endar.
Ruddingardagurin skal skipast soleiðis, at øll møta í skúlagarðinum kl. 10.00, har ein leiðari verður útnevndur fyri eitt minni øki, sum samskipar ruddingina.
Er gott veður, verður grillað, annars fáa øll suppu.

**Avgerð:** Tilmælið samtykt.

**Mál nr. 22/2007 Umhvørvismál.**
**Borð og stólar.**
Kommunan hevur viðtikið, at ruskíløt v.m. skulu setast upp fram við Mylluvegnum, og at stólar og borð verða sett upp fram við vegnum, so fólk kann seta seg niður at hvíla, og njóta náttúruna.

Mentanarnevndin mælir til, at keypa neyðugu borð og stólar, Ruskíløt skulu setast upp í nánd av borðunum.

Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá Mentanarnevndini.

**Avgerð.** Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 23/2007 Undirvísingarmál.**
**Ung í Føroyum.**
Í skrivi dagf. 12.02.2007 verður biðið samstarv um eina Ungdómsmentanarstevnu fyri 13 til 18 ára gomul í Runavík, í døgunum 23. og 24 mars 07.
Pláss er fyri 40 ungum fólkum á stevnuni og Runavíkar kommuna, ið stendur sum fyrireikari, søkir í skrivinum um fíggjarligan stuðul til Ung í Føroyum 2007.
Kostnaðurin er 57.000,00 kr. og stuðul úr Mentamálaráðnum er 20.000,00 kr.
Mett verður, at luttakaranir koma at gjalda 12.000,00 kr. (300,00 kr. pr. luttakarar sum vera 40 í tali).
Runavíkar kommuna stendur so fyri teimum 25.000,00 sum hon søkir um fíggjarligan stuðul til.

Mentanarnevndin fegnast um tiltakið og mælir til, at Nes kommuna játtar 5.000,00 kr. til tiltakið.

Fíggjarnevndini tekur undir við tilmælinum hjá Mentanarnevndini og at taka peningin av konto nr. 493635 ”Studningur til ymisk endamál”.

**Avgerð:** Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 24/2007 Trivnaðarmál..**
**Starvsfólk.**
Nes kommuna søkti eftir starvsfólki við ergoterapeautiskari, námsfrøðiligari e.l. útbúgving til aktivering, venjing o.a. umsorganararbeiðið í Dagtilhaldinum í Vesturskin, og skuldu umsóknirnar vera inni í seinasta lagið 05.02.2007.
Tá freistin var úti vóru 4 umsóknir innkomnar:
Nevndin fyri Tilhaldið hevur viðgjørt umsóknirnar og mælir til , at seta Mathildu Dam Lamhauge í starv.

Trivnaðarnevndin mælir til at taka undir við innstillingini frá nevndini.

**Avgerð:** Tilmælið frá Trivnaðarnevndini einmælt samtykt.

**Mál nr. 25/2007 Havnamál**
**Service til bátar.**
SD Beding søkir um økið vestanfyri bátahylin til vasking/máling av bátum, SD Beding kemur at installera reinsiverk, so virksemi verður umhvørvisvinarligt.

Tekniska nevnd viðgjørdi spurningin um reingerðisvirkið hjá SD Beding vestan fyri verandi bátahylar, og er sinnað at geva loyvið samb. innsendu tekning frá SD Beding dagf. 05.03.2007, og innrættan av økinum, og hvussu arbeiðsgongdin kemur at vera, saman við eini frágreiðing um hvussu upptøkan av vandamiklum evnum verður. Annars eftir vanligum treytum.

- At økið verður leiga
- At tekniska deild avsetur byggilinju og brunnin.
- Annars eftir galdandi byggireglugerð.

**Avgerð:** Tilmælið frá Teknisku nevnd samtykt.

**Mál nr. 26/2007 Byggimál.**
**Blákrossheimið.**
Teknistovan hevur gjørt útbjóðingartilfarið bæði til vegin sum skal gerast og grundøkið til Blákrossheimið klárt at senda út og er her talan um Tekn. P.01 dagfest 01.03.07 og Tekn. 01.03.07.
Arbeiðið verður boðið út og skal vera liðugt fyri summarfrítíðina.

Tekniska nevnd mælir til, at arbeiðið verður boðið út millum arbeiðstakarar í kommununi.

**Avgerð:** Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 27/2007 Ansingarmál**

Bygdaráðið samtykti at seta niður eina nevnd at gera málsetning fyri hvussu ansingarviðurskiftini skulu skipast í framtíðini.
Í nevndina vóru vald: Elin á Torkilsheyggi, Petur í Túni og Helen H. Jacobsen.

-------------------------